# Terrorjavnvág ella politikkur?



Hanin kom inn í heimin, bara fyri at berjast. Nakað soleiðis falla orðini av varrunum á nítiára gamla poetinum í kubansku kykmyndini hjá Teiti Árnasyni, sum hevur rullað eftir tjaldinum hjá Grímu hesar seinastu dagarnar. Og har stendur so ein dalsaki av vaksnum monnum og sleppur sær av við ágonguna ígjøgnum ein hvítan deyðan hana, sum liggur eftir á vali og bløðir út. Teitur punkteraði ikki á leiðini úr Hattarvík til Havanna. Saman við Katrini hevur hann sett á eina nýggja slóð í føroyskari list. Filmslistin. Gáttin er longu somikið høg, at ein nýggjur, lovandi heimur má liggja frammanfyri føtur teirra, bara karmurin røkkur, og virkishugurin trívist.

Ikki sørt, at associatiónirnar fella aftur á føroyskan politikk, tá ið hesin intensivi hanakampurin kemur í hæddina. Alt tykist so málleyst. Onkuntíð vónleyst. Hitt horisontala vinnur á tí vertikala. Alt flaknar út. Sveipini um einki øsir fólkið upp. Tær stóru visiónirnar og hugsjónirnar eru følnaðar. Tað er líkasum einki, ið tráðar eftir politisku hæddunum. Eftir sjálvsøgdum málum. Nú gjørdist hetta mest ein hanakampur fyri at vera ein hanakampur. Soleiðis tykist tað teimum flestu. Í hvussu so fer.

Hunangsmánaðin er gott og væl farin hjá hesi samgonguni. Sum ber navnið av sjálvstýri, men heldur man hava forskansað seg í heimastýrinum, í einum blendingi av vinstra, høgra, fundamentalismu og progressiviteti, sum ringur er at fáa greiði á. Hvaðni verri at stjórna. Líkist meira eini terrorjavnvág heldur enn eini roynd, at fremja skilagóðan politikk. Greipurnar av áraknútum stinga nú út ígjøgnum psykologisku kamasjubrøkurnar hjá teimum víðgongdu. Bara hetta ódemokratiska valið, av eini siðsemisnevnd, mátti verið meira enn nógmikið fyri ein flokk, sum Tjóðveldisflokkin, ið onkuntíð var somikið frambrúsin og radikalur, at hann ikki av egnum ávum legði seg í heimastýrisreiðrið og gloypti øllum sum fyri kjaftin rak.

Ígjár fylti Atli P. Dam 70 ár. Skilst at dagurin verður hildin við Trongisvágsfjørð leygardagin. Hiðani varpa vit honum tær bestu kvøður. Ynskja honum somuleiðis lýðku í einum blíðum lívskvøldi. Hann man vera eitt hitt stórsta politiska talentið, sum føroyingar nakrantíð hava átt. Krops- & sálarliga fullborðin. Gløggur, snúðin, pragmatiskur, væltalandi, stívur við penninum, úrmælingur í samráðing o.s.fr. Eitt somikið politiskt menniskja, at hetta helst hevði verið lívsleiðin, undir øllum umstøðum, eisini hóast førningurin, ið skuldi togast víðari fram á leið, ikki stóð har, tá ið hann varð lagdur í vøgguna suðuri á Tvøroyri. Sum tey flestu gjørdi hann sínar feilir. Hevur alment viðgingið at so var. Hetta er meiri enn hvatið teir flestu megna. Gemyttið var gearað. Kundi ikki kroystast niður í nakran konstrueraðan form. Eitt serligt slag, sum nú er farið at fækkast. Bevin, Brandt, Kreisky, Hækkerup, Dayan, Larsen, Gerhardsen o.a. Eitt lívsjáttandi fólkaslag, sum ongantíð hevði tørv á einum fremmandum image. Glæman, frá teirra egnu sál og heila, bræddi nógmikið fyri sær, at teir av sær sjálvum, av egnari uppdrift, kundu standa á odda á politiska svalanum.

Hóast ikki samdir í øllum, minni enn so, so mega vit ásanna, at Atli gjørdist eitt nýbrot í føroyskum politikki. Hann megnaði saman við einum øðrum politiskum stórtalentið, Finnboga Ísaksyni, at seta nýggjar konstellatiónir upp í føroyskum politikki, sum høvdu verið óhugsandi frammanundan. Og hóast hann meiri ella minni kom bóltandi inn í politikkin, eisini inn í gomlu politisku frymlarnar, har ið heimastýrisflokkarnir pr. definitión skulu kilstrast saman, høvdu teir meirilutan, so vendi hann rákinum, og breiðkaði spektrið, tá ið samgongan ímillum teir tríggjar: Tjóðveldis, - Fólka, - & Javnaðarflokkin varð skipað miðskeiðis í sjeytiárunum. Ein samgonga, sum hvørki hevði bylting ella fullveldi á síni dagsskrá, orðið var ikki uppfunnið tá, men sum hóast hetta legði nakrar álvarssamar ætlanir og framdi nøkur politisk stórverk, sum gagnaðu framtíðini. Hjá politiskt virknum tannáringum, kendist hendan samgongan í hvussu er, onkursvegna, sum ein renæssansa, í mun til tað ið verið hevði. Fiskimarkið, yvirtøkur, vaktartænastan, havrannsóknarskip, skúlaverkið, postverkið, EEC-málið. You name it.

Hetta er nú ein farin og minnisrík tíð. Fáir av aktørunum eru aktivir ídag. Onkrir farnir heim til fedrarnar. Fleiri givnir fyri tíðina. Tað er strævið at fáast við politikk. Bakkaloðararnir eru nógvir. Smásinnið stórt. Og nú vit standa á hesum vegamótinum, har framherjin frá sjeytiárunum fer um tey sjeyti, kundi tað kanska verið hóskandi at spurt, um ein konstellatión, ein samgonga, ímillum hesar flokkarnar ikki er møgulig ídag. Og um so er, hvør ið trupulleikin so man vera?

Tað røkist fyri ongum hjá samgonguni sum nú situr. Miðmenninir gjørdust strævnari enn væntað. Koyra fram sum hesir dresseraðu sirkushestarnir við skýklappunum. Grava seg niður í egnari fundamentalismu. Gjørdust ein statur í statinum. Mýkja roðini, sum Viderø segði, um hesar garvillu sektirnar, tá ið tær tulka og tamba tær heilagu skriftirnar, haðartil tær bara passa teimum sjálvum. Sjálvstýrisflokkurin leingist eftir hundraðáramótinum við einum sambandsmanni í framskutinum. Og onkur hevur ávísar fólkafloksmenn illtonktar fyri, at fáa gásarhold, hoyra teir orðið yvirtøku nevnt. Soleiðis liggur landið nú vit hava fingið takið á nýggju øldini.

Atli man vera hin mest maktfulli floksleiðarin sum føroyskur politikkur hevur átt. Var flokkurin. Ikki tí at hann var og er sonur pápa sín, men heldur tí at hann hevði hesi sjaldsomu leiðsluevnini, ið eru so fáum beskorðin. Nú ræður Jóannes fyri borgum. Er ikki komin líka væl út úr startholunum sum undanmaðurin, men tað man fara at bragda, við einum góðum vilja.

Nógv vatn er runnið í ánna í eina fjórðingsøld. Føroyingar eru nú komnir somikið langt ávegis, politiskt, at teir eru farnir at hugsa og droyma um republikkina. Nú tosið hevur gingið um svenskar konsulentar í javnaðarflokkinum, í eina tíð, kundi verið hóskandi at endurgivið Palme, sum í einum orðaskifti við Kreisky og Brandt sigur soleiðis um triðja heimin og hjálondini: Meginreglan hjá okkum øllum má vera, at vit taka atlit til tjóðskaparligu krøvini haðani. Tað snýr seg ikki bara um teir arabisku statirnar, men heldur um allan hin triðja heimin, - í heila taki. Ynskja vit hetta, so mega vit stuðla frælsisrørslunum. Vit mega góðtaka at teir berjast fyri fullveldinum. At teir stríðast fyri at vinna niðaná búskaparliga og at teir somuleiðis ætla sær at spæla ein størri leiklut í altjóða samfelagnum.

Kanska er tíðin komin hartil, at teir tríggir flokkarnir, sum vegaðu rás í sjeytiárunum, tá við lægri seglum enn nú eru hóskilig, skuldu farið at tosa saman aftur, við eini dagsaktuellari skrá, sum røkk fram í fullveldið. Kanska skála tit fyri hesum nýggja leisti, suðuri í Trongisvági, leygarkvøldið. Einum nýggjum føgrum heimi. Eini virðiligari framtíð.

Hanakampurin hjá Teiti endar hvørt kvøld niðri á gamla Meiarínum. Svartur vinnur á hvítum. Veljarakanningar benda á tað sama í føroyskum politikki. Kanska kann hetta broytast, um tríggir hvítir hanar finna saman í konstruktivum og progressivum samstarvið. Lívið má vera annað enn ein primitivur hanakampur. Serliga tá ið tað ræður um, at leggja framtíðina hjá eini heilari tjóð til rættis. Hetta var partvíst ætla sum ein føðingardagsheilsan. Tillukku Atli !

**FREGNIR**




Lærlingurøkist...



**til goymsluna skjótast gjørligt FHS krevst, og tað er ein fyrimunur um umsøkjarin hevur koyrikort**

VR BILAR

Sp/f VR-bilar
Hoyvíksvegur 61
Tlf 322 110
Att: Agata

VOLVO
RENAULT



NATEN 1-2-3

- propolis
- bee pollen
- royal gelé

*natúrligt kostískoyti til 30 dagar kr. 300,-*

-Ringið og vit senda-

**Naten søla**
Tórshavn • Tel. 31 86 49

Sosialurin - 311820


TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Dagstovnurin Lítliskógur**

Á Lítlaskógi ganga 88 børn.

Á stovninum eru:
- tvær vøggustovur við 10 børnum
- fýra barnagarðsstovur við 17 børnum, har tey 6 ára gomlu børnini eru í einari.

www.torshavn.fo

## Pedagogur

Tórshavnar kommuna søkir eftir pedagogi til Dagstovnin Lítlaskóg.

**Starvið**
Talan er um eitt starv fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi 35 tímar um vikuna í barnagarðstovu við 6 ára gomlum børnum. Starvið er í fyrsta umfari til summarfrítíðina 2003.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv, har tú fært møguleika at seta tín dám á stovnin.

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Frígerð Sundsskarð, leiðara, ella Heidi Norðoy, varaleiðara tlf. 319131

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Lítlaskógi, postsmoga 217, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 27. september 2002.

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2636, Sp/f Højbilar, 490 Strendur.

**Viðtøkur broyttar:** 13.08.2002.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Joen Martin Høj, 490 Strendur (formaður)
**Innkomin sum formaður:** Tummas Jákup Høj, 490 Strendur.
**Innkomin í nevndina:** Signar Martin Høj, 490 Strendur.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Tummas Jákup Høj, 490 Strendur.
**Innkomin sum stjóri:** Margit Høj, 490 Strendur.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka ferðafólka- og farmaflutning, handil, byggivirki og annað virksemi sum hevur samband við nevndu vinnur.

*Skráseting Føroya tann 12. september 2002*

*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 2799, P/F Viking Seafood, 490 Strendur.

**Viðtøkur broyttar:** 03.09.2002
**Nýtt hjánavn:** P/F Viking Salmon (P/F Viking Seafood)
**Adressa:** Box 80, 490 Strendur
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av nevndarformanni saman við einum stjóra, meira enn helvtina av nevndarlimunum ella av allari nevndini.

Felagið er samanlagt við skrásetingar-nr. Sp/f 2984, Sp/f Víkingur og skrásetingar-nr. Sp/f 2485, Sp/f Viking Salmon, sum samstundis verða strikaði.

*Skráseting Føroya tann 11. september 2002*

*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 123, P/F Leif Mohr, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:** 08.08.2002.
**Nýtt hjánavn:** P/F LM Frost (P/F Leif Mohr)

*Skráseting Føroya tann 12. september 2002*

*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 754, Sp/f 23.10.1997, 510 Gøta.

**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Jan Erik Niclasen, 660 Søldarfjørður.
**Innkomin sum stjóri:** Niels Juel Nattestad, Fugloyarvegur 7, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 12. september 2002*

*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 421, P/F Fóm, 100 Tórshavn.

**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Árni Svartafoss, Undir Svartafossi 8, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 12. september 2002*

*Kristin Balle*

---

# Telduskeið í Fuglafirði

Telduskeiðini í vetur byrja aftur 23. september.

**Undirvíst verður í:**
Grundskeið í teldu
Internet og postur

Tekstviðgerð í Word
Rokniark Exel

Heimasíðusmíð
Myndaviðgerð
Flash



Bókhaldsskipanin Stellar Office (Grundskeið).

**Atlantic Online**
Fuglafjørður
Tlf. 444487 – 219920
Teldupostur: atlantic@online.fo

# Eykaaðalfundur

Borðtennissamband Føroya hevur eykaaðalfund leygardagin 28. september kl. 10.00 í ÍSF-húsinum.

Skrá:
1) Val av kappingarnevnd
2) Ymiskt

**Nevndin**


# Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

**Nú eisini úr Føroyskum gróti**

Skjót levering



Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Danstein
Tel. 447512
Tel. 217512
Tel. 318323
Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Sosialurin - 311820


# Fólk til sølubúðina

**Sjálvsognarstovnurin Alv søkir eftir einum fólki uml. 1/2 tíð, til sølubúðina á Vaglinum, Tórshavn.**

Starvið verður at byrja 1. oktober 2002 ella skjótast gjørligt.

**Vit síggja fegin at tú hevur:**
- Áhuga og royndir í at standa í handli.
- Dugir at tosa danskt, enskt og helst eisini týskt.
- Ert fyrikomandi og sjálvstøðugur.

Av tí at vit selja heimagjørdar vørur, er ynskiligt at umsøkjarin hevur kunnleika til handgjørdar vørur.

Meira fæst at vita við at venda sær til Kristinu Larsen, tlf 211135.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 20. september 2002.

**Sjálvsognarstovnurin Alv**
Boks 301
110 Tórshavn

# Sølufólk

Vit sóknast eftir fólki til gólvdeildina í Vøruhúsinum á Hjalla at seta skjótast gjørligt.

Arbeiðið umfatar avgreiðslu av kundum og annað fyrifallandi arbeiði.

Nærri upplýsingar á tlf. 342500 ella 216755, Sólbjørn.

LITAVAL P/F

Postboks 1019
100 Tórshavn
E-mail: st@litaval